Vælkomin til dyst í Fløtugerði



HAVSBRÚN

Leikskrá nr.10

Fríggjadagur 12. august 2016

effo deildin

Mynd: Jens Kristian Vang

# Dysturin í dag

Vælkomin til Effodyst á Fløtugerði í Fuglafirði, og vælkomin til Føroya besta lokal-derby. Nú eru vit komin í gongd við síðsta triðingin av kappingini, og mugu vit ásanna at okkara leiklutur í kappingini er við at halda okkum á einum sætta plássi, tí tað er langt bæði upp til fimta pláss og niður til strikuna. Vit kunnu velja at gera sum seinasta umfar har vit vórðu huðflongdir við Løkin ella at gera sum vit gjørdu við Djúpumýru, har vit hølvaðu greiða oddaliðið KÍ av. Leikluturin er ikki heilt útspældur enn, og hava vit enn ein teoretiskan møguleika at leika okkum til europe'iskan fótbólt, tvs 4. pláss, og eiga vit at leggja okkum í seðlarnar fyri at royna eftir hesum møguleika. Í dag kemur Víkingur á vitjan og verður støðan á stigatalvuni gloymd eftir at dysturin er brígslaður í gongd og fara bæði liðini at gera sítt fyri at vinna stigini og argingarrættin. Hyggja vit eftir hagtølunum so er eitt púra vist, tað verður altíð skora í hesum uppgerðum og í 95% av dystunum skora bæði liðini. Hetta er seinni heimadysturin hjá okkum móti Víkingi í ár, orsaka av onkrum programfeili hava vit tveir heimadystir móti teimum í ár.

Koyrið á drongir.
Góðan dyst øll somul

*Birgir*

ÍF
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

LEIKSKRÁIN:
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: Hildur Høghamar



Birgir Petersen
ábyrgdarblaðstjóri

Fyrr í ár gekk tað soleiðis

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3 | 19-03-2016 | ÍF-Víkingur | 2-2 |

Í 2015 gekk tað soleiðis

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | 01-03-2015 | Víkingur-ÍF | 2-2 |
| 12 | 17-05-2015 | ÍF-Víkingur | 1-3 |
| 21 | 30-08-2015 | Víkingur-ÍF | 4-2 |

Í 2014 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 | 04-05-2014 | Víkingur-ÍF | 1-1 |
| 17 | 04-08-2014 | ÍF-Víkingur | 2-2 |
| 24 | 05-10-2014 | Víkingur-ÍF | 5-0 |

Í 2013 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5 | 07-04-2013 | Víkingur-ÍF | 3-2 |
| 14 | 21-06-2013 | ÍF-Víkingur | 2-1 |
| 24 | 29-09-2013 | Víkingur-ÍF | 2-1 |

Í 2012 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5 | 21-04-2012 | ÍF-Víkingur | 1-2 |
| 16 | 01-08-2012 | Víkingur-ÍF | 1-4 |
| 23 | 12-09-2012 | Víkingur-ÍF | 0-3 |

Í 2011 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 9 | 23-05-2011 | Víkingur-ÍF | 1-0 |
| 18 | 21-08-2011 | ÍF-Víkingur | 1-2 |
| 26 | 16-10-2011 | Víkingur-ÍF | 4-0 |

Í 2010 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 9 | 24-05-2010 | Víkingur-ÍF | 1-3 |
| 18 | 15-08-2010 | ÍF-Víkingur | 0-1 |
| 27 | 23-10-2010 | Víkingur-ÍF | 1-3 |

Í 2009 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | 03-04-2009 | Víkingur-ÍF | 2-0 |
| 10 | 01-06-2009 | ÍF-Víkingur | 1-2 |
| 19 | 16-08-2009 | Víkingur-ÍF | 2-3 |

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

## Tippikapping

Aftur í ár fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á einum leikara, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur. Lutakast verður síðan ímillum teir seðlar, ið hava flest røtt svar. Drigið verður fyri hvønn triðja heimadyst, og verður vinnarin uppringdur.

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| NSÍ | HB | | | | |
| **B36** | **ÍF** | | | | |
| KÍ | TB | | | | |
| Víkingur | Skála | | | | |
| AB | B68 | | | | |
| Navn: | | | | | |
| Telefonnummar | | | | | |





**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo



NORÐOYA SPARIKASSI



www.ns.fo

Netbankin
sum app
skanna kotuna

Ert tú lesandi í Føroyum ella uttanlands, er lætt at avgreiða fíggjarligu viðurskifti tíni í Norðoya Sparikassa.

Bílegg eitt ungdómsprát á tel. 47 5000

UNG 13-25 NemKonta Netbankin Gjaldkort Ráðgeving

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

Linde Gas ] AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

Opnigstíðir:
Mána. - Fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo
www.gassola.fo

# Kvøða til ÍF á 70 ára degnum

Súni Fríði Barbá



Tá eg bleiv spurdur, um eg kundi skriva okkurt um ÍF á 70 ára degnum hjá felagnum, fór eg at hugsa um ymisk tíðarskeið. Endin varð, at eg tók av at skriva um mínar fyrstu upplivingar uttanfyri bøgarðarnar viðvíkjandi føroyskum 1.deildarfótbólti.

***Soleiðis minnist pilturin fótbóltsárið 1979:***

Eysturoyar feløgini vóru so spakuliga byrjaði at røra uppá seg, hóast enn tyktist langur vegur til siðursvandu feløgini HB, KÍ og TB.

ÍF var í so máta flaggskipið í Eysturoynni, tá tað kom til fótbólt. Við sínum 1400 fólkum var grundarlagi avgjørt tilstaðar.

NSÍ har 2 av mínum brøðrum hjá mær leiktu við, hevði roynt seg móti teimum stóru fyrsu ferð í 1976. Tann royndin hilnaðist illa við ongum stigi til høldar. Í 1979 royndu runavíkingar seg aftur. Hesaferð gekk eitt sindur frægari, tá felagið megnaði at fáa 4 stig við spæla fýra javnleikir.

Gøtumenn og Toftamenn vóru so spakuliga byrjaðir at gera um seg meðan EB, LÍF, Skála og Streymur hildu til í teimum lægru deildinum.

Í barnaheiminum hjá mær var m.a. fótbóltur ofta samtaluevni. Um tað ikki var enskur fótbóltur, so var tað føroyskur.

Í kamarinum hjá mær hekk ein stór plakat av 1977/78 hetjunum Nottingham Forest, ið hevði á fyrsta og einasta sinni vunnið táverandi bestu deildina 1.deild.

Við síðunar av tí plakatuni hekk ein onnur plakat við navnframa leikarinum George Best sála, ið fólk best kendu frá Manchester United tíðini og Norður Írska landsliðnum. Hendan plakatin var frá síðsta árinum hjá honum í United í 1974. Hesin leikarin minti meg á ein annan føroyskan leikara, ið búðleikaðist í Fuglafirði.

Eg hevði sæð ÍF leikt 2 ferðir móti NSÍ í kappingarárinum. Báðu ferðirnar vunnu teir rímiliga greitt við 3 málum móti einum. Heimadysturin hjá ÌF móti NSÌ bleiv leiktur í Gøtu, tí at vøllurin í Fuglafirði ikki var klárur fyrr enn í seinnu hálvu, vegna breikan av vøllinum í Fløtugerði. Meini vist, at teir vandu alla fyrru hálvu á Skála.

**Sunnudagur 30/9-1979**

Pápi mín, ið var íðin fótbóltsfjeppari, plagdi at fylgja NSÌ, har synirnir leiktu við. Toftamaður við stórum "T" og vísti heimbygdini stóran

Framhald á síðu 18

# Tips 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Hvør spurningur gevur 1 stig. Spælt verður eftir vinnarin situr-leistinum. Ein leikari luttekur hvørja ferð, og spælir hann í móti einum, ið á ein ella annan hátt, hevur okkurt við ÍF at gera. Verður svarað skeivt uppá spurningar, sum beinleiðis hava við ÍF at gera, telur tað hálvt minusstig. Endar tað við javnleiki, verður eykaspurningur gjørdur, ið hevur eitt talvirði. Vinnarin er so viðkomandi, ið gitir nærmast rætta svarinum. Eftir at Andrias ikki megnaði at koppa Rúna síðst, kom túrurin til Poul, sum fegin tók í móti avbjóðingini. Rúni vísti seg frá síni skilabestu síðu og megnaði at vinna ein tepran 7-6,5 sigur. Eins og siðvenja er, so fingu teir møguleikan at vedda sínamillum, men tóku teir ikki av – teir valdu heldur, at taparin skuldi bjóða vinnaranum og greinaskrivaranum okkurt leskiligt. Samlaða støðan er nú 9-1 til fjepparanar, so vit bíða í spenningi til næsta heimadyst fyri at vita, um næsti leikarin megnar at minka um munin.

Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | PNM | RP |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 16. oktober 2002 tapti Føroyar 2-1 móti Týsklandi á útivølli. Hvør týskari gjørdi sjálvmál hendan dystin? | Arne Friedrich | Carsten Ramelow | Jens Jeremies | 1 | 1 |
| 2 | Hvat blusu nummar hevur nýggi Chelsea leikarin N'Golo Kante? | 5 | 7 | 15 | 1 | 0 |
| 3 | Í hvørjum felagi er David Moyes júst settur sum venjari? | Hull | West Bromwich | Sunderland | 1 | 1 |
| 4 | Hvør av hesum leikarum var ikki valdur til "team of the tournament" í EM, sum var í summar? | Aaron Ramsey | Toni Kroos | Luka Modric | 1 | 0 |
| 5 | Hvør er toppskjútti hjá ÍF í 2. deild í løtuni? | Nenad Saric | Bartal Eliasen | Margeir Toftegaard | -0.5 | -0.5 |
| 6 | Úr hvørjum landi er nýggi Juventus leikarin, Miralem Pjanic, frá? | Kroatia | Bosnia Hersegovina | Montenegro | 1 | 1 |
| 7 | Hvat felag hevur keypt fyrrverandi Manchester United og Fenerbache leikaran Nani? | Valencia | Atletico Madrid | Villareal | 1 | 1 |
| 8 | Hvussu nógvar dystir hevur Andras Gango leikt fyri besta liðið hjá ÍF? | 84 | 94 | 104 | -0.5 | 1 |
| 9 | Hvør av hesum landsliðsleikarum hevur leikt flestar dystir fyri Føroyar? | Rógvi Baldvinsson | Hallur Hansson | Pól Jóhannus Justinussen | 0 | 1 |
| 10 | Hvat danskt superligufelag hevur Jákup á Borg umboðað eitt stutt skifti? | Farum (nú FC Nordsjælland) | OB | Viborg | 1 | 1 |
| 11 | Hvør misnýtti avgerandi brotssparkið fyri Atletico Madrid í ársins Champions League finalu? | Koke | Juanfran | Gabi | 1 | 0 |
| 12 | Hvør av hesum leikarum bleiv innskiftur í ársins Euro League finalu? | Lucas Leiva | Jordan Henderson | Joe Allen | 0 | 1 |
| 13 | Hvør leikari hjá ÍF bleiv inn- og útskiftur í móti 07 Vestur í síðsta dystinum í 2011? | Uni Reinert Petersen | Margeir Toftegaard | Frank Poulsen | -0.5 | -0.5 |
| | **Tilsamans** | | | | **6,5** | **7** |

Rætt svar: 1 - X - 2 - 2 - 1 - X - 1 - 2 - 1 - X - X - 2 - 1




**Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.**

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**


usedbaader.biz
BAADER service
OG SMIÐJUARBEIÐI
Okkara vælútgjørda smiðja niðan fyri Bedingina í Fuglafirði megnar allar vanligar smiðjuuppgávur, stórar sum smáar.
Umframt sjálva smiðjuna hava vit stóra goymslu við rustfrium tilfari, ketum, legum, gearum, motorum o.s.fr.
Ring til okkara á 775 775, ella vitja okkara heimasíðu: www.pl.fo fyri at fáa meira at vita.
BAADER
fomaco
Ulbo SystemPac
euskan++
Tel 775 775
www.pl.fo
peturlarsen


CAPTO
TIL FLÓTITROL
RÆTTILIGA FANGANDI
CAPTO er ein nýggjur nettráður til flótitrol sum VÓNIN hevur ment.
Set teg í samband við okkum fyri at hoyra meira. Sí www.vonin.com
VÓNIN


Vit gera
– vegir
– gongubreytir
– tún
– parkeringsøkir o.a.
Vit planera
og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179


Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið
SK
SVENDKROSSTEIN
Pf. Svend Krosstein · Falkavegur 6 · Postboks 3229 · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 · Fax +298 344 601 · www.krosstein.fo · krosstein@krosstein.fo

## HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| **12/8/2016** | **ÍF-Víkingur** |
| 14/8/2016 | B68-B36 |
| 14/8/2016 | TB-AB |
| 14/8/2016 | HB-KÍ |
| 14/8/2016 | Skála-NSÍ |

## KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 21/8/2016 | Víkingur-Skála |
| 21/8/2016 | AB-B68 |
| 21/8/2016 | NSÍ-HB |
| **21/8/2016** | **B36-ÍF** |
| 21/8/2016 | KÍ-TB |

## TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|
| Klæmint A. Olsen | 19 | NSÍ |
| Jóannes Bjartalíð | 15 | KÍ |
| Páll A. Klettskarð | 14 | KÍ |
| **Adeshina A. Lawal** | **11** | **ÍF** |
| Sølvi Vatnhamar | 10 | Vík. |
| Albert Adu | 9 | TB |
| Filip Djordjevic | 8 | Vík. |
| Árni Frederiksberg | 8 | NSÍ |
| Hans Pauli Samuelsen | 7 | Vík. |
| Patrik Johannesen | 7 | AB |

## MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | Mál |
|---|---|
| **Adeshina A. Lawal** | **11** |
| Clayton Soares do N. | 4 |
| Bogi Reinert Petersen | 4 |
| Dánjal á Lakjuni | 3 |
| Andy Ó. Olsen | 2 |
| Poul N. Mikkelsen | 1 |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 1 |
| Kristoffur Jakobsen | 1 |
| Jan Ó. Ellingsgaard | 1 |

## STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 19 | 14 | 2 | 3 | 43 | 15 | 28 | 44 |
| 2 | Víkingur | 19 | 12 | 4 | 3 | 42 | 21 | 21 | 40 |
| 3 | NSÍ | 19 | 13 | 0 | 6 | 47 | 29 | 18 | 39 |
| 4 | HB | 19 | 10 | 4 | 5 | 32 | 19 | 13 | 34 |
| 5 | B36 | 19 | 9 | 5 | 5 | 28 | 19 | 9 | 32 |
| **6** | **ÍF** | **19** | **7** | **4** | **8** | **31** | **41** | **-10** | **25** |
| 7 | TB | 19 | 4 | 5 | 10 | 18 | 31 | -13 | 17 |
| 8 | Skála | 19 | 4 | 5 | 10 | 14 | 28 | -14 | 17 |
| 9 | AB | 19 | 1 | 6 | 12 | 18 | 34 | -16 | 9 |
| 10 | B68 | 19 | 0 | 7 | 12 | 17 | 53 | -36 | 7 |



| | | |
|---|---|---|
| 1 | Andrias Poulsen | |
| 2 | Gunnar Christiansen | |
| 3 | Poul N. Mikkelsen | |
| 4 | Alex Jose dos Santos | |
| 5 | John Daniel Guðjónsson | |
| 6 | Karl A. Løkin | |
| 7 | Dánjal á Lakjuni | |
| 9 | Kristoffur Jakobsen | |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard | |
| 12 | Elias Rasmussen | (M) |
| 14 | Dánjal Pauli Højgaard | |
| 17 | Leivur Joensen | |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento | |
| 20 | Jóhan Petersen | |
| 22 | Ingi Sørensen | |
| 23 | Andy Ó. Olsen | |
| 27 | Margeir Toftegaard | |
| 28 | Hanus Eliasen | |
| 30 | Adeshina A. Lawal | |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard | (L) |
| 46 | Jákup Mikkelsen | (M) |
| 80 | Tóri T. Traðará | (M) |

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Geza Turi | (M) |
| 2 | Andreas Lava Olsen | |
| 3 | Hanus Jacobsen | |
| 4 | Atli Gregersen | (L) |
| 5 | Dánjal Pauli Lervig | |
| 6 | Sámal Jákup Joensen | |
| 7 | Jón Krosslá Poulsen | |
| 8 | Heðin Hansen | |
| 9 | Filip Djordjevic | |
| 10 | Sølvi Vatnhamar | |
| 11 | Hans Pauli Samuelsen | |
| 13 | Erling D. Jacobsen | |
| 14 | Magnus Jarnskor | |
| 15 | Jákup V. Olsen | |
| 16 | Hans Jørgen Djurhuus | |
| 17 | Finnur Justinussen | |
| 19 | Sorin Anghel | |
| 20 | Hjalti Strømsten | |
| 21 | Gert A. Hansen | |
| 24 | Gunnar Vatnhamar | |
| 25 | Bárður á Reynatrøð | (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari | Jákup Mikkelsen |
| Venjari | Símun Eliasen |
| Liðleiðari | Ólavur Larsen |
| Liðleiðari | Trúgvi Nesá |
| Liðleiðari | Dan Petersen |

| | |
|---|---|
| Venjari | Sámal Erik Hentze |
| Hjálparvenjari | Sorin Anghel Vasile |
| Málmansvenjari | Eugen Voda |
| Fysioterapeutur | Rannvá Lava Olsen |
| Liðleiðari | Álvur Joensen |
| Liðleiðari | Jan Eli Dam |
| Liðleiðari | Jógvan Marius Hansen |
| Liðleiðari | Magni Jarnskor |

Bóltstuðul er Leif Andre Eliasen

Dómari: Alex Troleis
Hjálpardómarar: Jan Andersen, Jan Hermansen
4. dómari: Bjarki Danielsen
Eygleiðari: Lassin


sponsored
by
INTERSPORT
Thomas Dam Ítróttur


Leiðandi reiðarí
í norðurhøvum
Finnur Fríði
Jupiter
Tummas T
VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tlf: 610600
Faks: 441650 | vardin@vardin.fo | www.vardin.fo


pls.fo
SPORA BILIN
OG FÁ GLEÐI AV FYRIMUNUNUM
1. Minni slit av dekkunum
2. Lægri brennievnisnýtslu
3. Høgligari túrar
UPPMÁTING PR. AKSIL U/MVG 475,-
SPORING EFTIR AVTALU
RING 765 765
OG AVTALA TÍÐ
stórbilar
verkstaður & sala
Tel 765 765 · www.pls.fo



VEST PACK
VEST PACK
...meira enn pakkitilfar!
▼ Arbeiðsklæðir ▼ Kjølsvín ▼ Balliplast
▼ Oljusperringar ▼ Pakkimaskinur ▼ og meira afturat
Høvuðsvirkisøkið hjá Vest Pack er plast- og etikett framleiðsla. Seinnu árini hevur Vest Pack eisini verið heildarveitan av pakkitilfari og ti, sum fylgir í kjalarvorninum av ti - tvs. at veittar verða eisini vørur, sum ikki eru partur av sjálvari framleiðsluni, so sum pappeskjur, blokkumslog, pakkimaskinur osv.
Styrkin hjá Vest Pack er millum annað fleksibilitetur, eitt nú av ti, at vit hava framleiðsluna í húsinum og ikki hinumegin viða hav. Somuleiðis kunnu vit tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, eitt nú hvat viðvíkur nøgdum, har vit hava eitt lægri minstamark fyri serframleiðslu enn okkara kappingarneytar uttanlands. Vest Pack er ISO 9000 góðkent eisini framleiðslan.
FO-350 Vestmanna · Faroe Islands · Telefon +298 42 41 07 · www.vestpack.fo




Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald
Bilverkstaðið á Kambsdali
Tlf. 441111




Ætlar tú at
selja tíni hús
í Fuglafirði ?
- vit hava
keyparar,
ið bíða
Niels Finsensgøta 37
Tórshavn | Tel 348 900
inni@inni.fo | inni.fo
INNI




Vitja handil
okkara á Hjalla
Her fær tú alt innan vask og
reingerð á einum stað
KEMILUX
www.kemilux.fo




MAGN KAFFI
NÝMALIÐ - VISTFRØÐILIGT
Vel ímillum kaffi, kaffi v/mjólk,
caffè latte ella cappuccino.
Helst Føroya
besta kaffi
to go
FAIRTRADE

Framhald av síðu 7

áhuga í øllum, ið har fyrifórst. Men hendan dagin skuldi leiðin ganga inn til Fuglafjarðar at hyggja eftir ÍF og B36.

TB skuldi spæla móti NSÍ, og her var alt annað enn ein greiður TB sigur væntandi. TB hevði somuleiðis betri málmun, so ÍF máttí vinna á B36 um teir skuldu tryggja sær FM heitið.

Minnist at pápi og eg fóru avstað við Toyota Mark 2 bilinum, sum elsti beiggi mín hevði keypt frá Símun á høgabóli. Beiggjarnir vóru á Tvøroyi og leiktu dyst. Komnir inn móti Kamsdali, har vóru ikki sum í dag hús og vinnubygningar at síggja, men leguhúsið, ið man hevur havt so nógvar góðar løtur stóð har. Babba var altíð í góðari tíð. So vit fóru oman á Muntra at eta áðrenn dystin. Har vóru nógv fólk. Babba fekk sær dagsins rætt. Eg minnist fryntliga mannin, ið serveraði fyri okkum. Talan var um eigarin Petur Mohr. Eg fekk eplamos og reyðar pylsir. Tá ið vit vóru lidnir at eta og vóru á veg niðan á vøllin, tá kom hann og gav mær eitt av teimum vælumtóktu trýkantaðu appilsingulu sunkistinum. Hatta skalt tú eiga, segði hann.

## Dysturin ÍF - B36

Ongantíð áður havi eg sæð so nógvar áskoðarar til fótbóltsdyst. Har vóru fløgg, fýrverk og sum ofta tá ið tíðini spældu hornaorkestri fyri dystarbyrjan og í hálvleikstegðinum.

At ÍF ikki fór at fáa ein lættan dyst sást beinavegin. B36'arnir vóru við yvirlutan eina stóran part av fyrra hálvleiki. Men ungi málverjin (Ovi Joensen) stóð stinnur tá boð var eftir honum.

## George Best lookalike og Nottingham Forest litirnir

*Nottingham Forest litirnir hjá ÍF* - vóru sum sól í eygunum hjá piltinum.

Serliga var tað ein ÍF leikari, sum stendur sera sterkur í minninum. Talan er um Birgir Thomsen sála: Hann líktist sera nógv navnframa George Best, bæði tá tað kom til útsjónd eins og í spælistíli. Stórt myrkt hár og viðhvørt við fullum skeggi. Tá hann fekk bóltin úti á kantinum, sá tað so sera lætt út hjá honum við skjótum fótskifti, at enten seta leikarar av ella at fáa góð innlegg inn í brotsteigin.

Samanspælið millum hann og høga tanksenturforvardin Meinhard Dalbúð var ein frægd at síggja. At hann eisini kundi vísa máltev, gjørdi tað hann til ein sera týðandi og vandamiklan spælara.

Eisini varnaðist eg liðskiparan aftarliga á miðvøllinum, ið bant liðið saman (Sonni Jensen). Hann rann nógvar metrar og spældi sær altíð skilagott av við bóltin. Har var eisini ein ungur Abraham, ið undiritaði sjálvur kom at vinna FM heitið saman við í 1992. Longu tá var hann eisini byrjaður at røra uppá seg. Somuleiðis var eg serliga imponeraður av Hermanni Midjord og Kristianni Petersen, ið leiktu í verjuni. Hermann, ið sparkaði líka hart sum ein hestur og Kristian, sum vann hvønn nærdyst. Ungir og eldri leikarar, sum vístu seg at vera likamliga í besta formi.

Seinna helvt av greinini verður í komandi leikskrá


Tryggja tær
HÚS & HEIM




Trygdarpakki við eldsløkkjara,
Brandteppi & tveimum
tráðleysum roykvarnarum

Prísur: 995 kr

Ein TRYGG rýmingarleið



Í húsum við fleiri hæddum sova vit ofta á loftinum.
Kyknar eldur, kann tað gerast ógjørligt at flýggja.
Í slíkum førum er tann kollveltandi MODUM brandstigin
ein trygg loysn og samstundis tín einasti útvegur.

Hann er heftur uttan á húsini og nærum ósjónligur,
tá ið hann er lagdur saman. Í neyðstøðu verður hann
lættliga latin upp, so tú skjótt og trygt kanst ganga niður.

Fæst í øllum longdum. Vit átaka okkum uppseting.

Fønix
Mykinesgøta 8 - 100 Tórshavn - Tel +298 311909



Jógvan Weihe
Stiðjagøta 10 · FO-100 Tórshavn
Tel. 35 38 97 · Fax 35 38 98

SalongHalda.fo
Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta

Opið er:
Mánadag 9.00 - 17.00
Týsdag 9.00 - 19.00
Mikudag 9.00 - 19.00
Hósdag 9.00 - 18.00
Fríggjadag 9.00 - 17.00
Leygardag 9.00 - 13.00
Opið er eisini eftir avtalu

Online booking
www.salonghalda.fo



teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo
Henning Olsen
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo
510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo




KSS
GER SJÓLÍVIÐ LÆTTARI
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ
Kósaskákið 3 FO-700 Klaksvík Tel. +298 472030 Fax +298 472031 T-postur: kss@kss.fo www.kss.fo

**5 feðgar**

| Navn | Eldri | Yngri | Dystir tils. |
|---|---|---|---|
| Áku og Áki Petersen | 65 | 296 | 361 |
| Kaj Eli og Frank Poulsen | 81 | 240 | 321 |
| Ove og Allan Joensen | 140 | 42 | 182 |
| Haldor og Sverri Ellingsgaard | 14 | 166 | 180 |
| Meinhardt og Øssur Dalbúð | 79 | 73 | 152 |

## ÍF'arin




Navn: Margeir Toftegaard
Føðingardagur: 29. juni 1994
Føðistað: Tórshavn
Starv: Lærlingur hjá KJ Hydraulik
Pláss á vøllinum: Áleypari
Yvirtrúgv: Nei
3 orð sum lýsa teg: Reyðhærdur, bráður og mumli illa
Torførasti mótstøðumaður: Clayton Soares
Frítíðarítriv: Mær dámar væl at fiska
Vónir fyri 2016: Vit skulu í øllum førum røkka einum 4. plássið og 2. deild flyta upp í 1. deild

## Tín Ítrótt:

Fyrsti dystur á 1.liðið: 4. mai 2011
Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF: Eg veit ikki heilt, men eg havi verið um 6 ár
Aðrar ítróttargreinar: Eg íðki ongar aðrar ítrottargreinar í løtuni, men eg havi svomið og spælt flogbólt fyrr
Minningarríkasti dystur: Mín minningarríkasti dystur var í 2011, tá ið vit spældu í Gundadali ímóti FC Hoyvík við 2. deild. Vit førdu 5-2, men venjarin var ónøgdur, tí vit misnýttu ov nógvar kjansir, tískil tók hann áleyparan út og setti Trúgva Nesá inn ístaðin, ið skoraði til 6-2!
Størstu fótbóltsliga ávirkan: Mamma, babba og Hagbard
Besti fótbóltsleikari: Cristiano Ronaldo
Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt: So hevði eg spælt PokemonGO
Hvat slag av venjing dámar tær best: Skotvenjing
Hvat slag av venjing dámar tær ikki: Renning

## Tínir favorittar:

Matur og drekka: Ræstkjøt og mjólk
Slag av tónleiki: Mær dámar næstan øll sløg av tónleiki, men mær dámar sera væl Mumford & Sons, ið spæla indie folk rock.
Sjónvarpssending: Outlander og The 100
At slappa av: Tá ið eg slappi av, liggi eg á sofuni og hyggi eftir góðum sendingum
Troyggja nr.: 27
Besti fótbóltsleikari nakrantíð: Cristiano Ronaldo
Sjónvarp/filmstjørna: Dwayne Johnson - "The Rock"
Besta bók/blað: Leikskráðin í dag
Stuttligasti persónur: James Corden
Stuttligasti í hópinum: Beiggjarnir á Kambsdali Jan og Ari
Besti ÍF áskoðari: Mamma (Durita Toftegaard)

## Leikarafakta:

- Er íðin fjeppari av Arsenal
- Hevur umboðað ÍF, NSÍ, KÍ, Víking og B71
- Hevur í fleiri ár verið millum mest skorandi leikarar í 2. deild.
- Hagtølini siga 76 dystir og 50 mál í 2. Deild
- Hevur í skrivandi løtu spælt 5 dystir í effodeildini, 3 í steypakappingini og 18 í 1. deild
- Er sonur til virkandi forkvinnu, Duritu Toftegaard
- NSÍ leikarin Einar Tróndargjógv er mammubeiggi hansara
- Margeir skiftir blusunummar nærum hvørt ár
- Var við á U18 liðnum hjá KÍ í 2012, sum gjørdist nummar 1 í landskappingini, og kom í hálvfinaluna í steypakappingini
- Heldur saman við Jóhonnu Lervig, sum spælir á kvinnuliðnum, sum er felagslið við Víking
- Er ógvuliga sjónligur á sosialum miðlum


Álvaskot
Fysioterapi
v/Álvur Hansen
44 51 44

VØRÐSLAN
WEARHOUSE
"...klæðir og skógvar til hennara hansara og børnini, nú alt undir somu lon"





